# Sjónvarpsdokumentar til útbjóðingar

**Arbeiðsheiti:** Dokumentarsending
**Miðil:** Sjónvarp/net
**Hvat:** Ein dokumentarsending í sjónvarpinum, ið verður send sum hóskvøldssending
**Longd:** 25 - 45 minuttir
**Staðseting:** Mentan, Kringvarp Føroya
**Redaktionell ábyrgd:** Mentan

## LÝSING

Kringvarp Føroya bjóðar alment út til programfólk at gera dokumentarsending/ar til sjónvarpsskránna 2019/20. Hvørt hóskvøld í vetrarskránni eru føroyskar sendingar á skrá, programmfólk og fríyrkisfólk framleiða, umframt at KVF keypir rættindi til sendingar.

Hevur tú hugskot og hug at verða í hesum toymi og gera dokumentarsending/ar, ert tú vælkomin at senda títt boð inn til Kringvarp Føroya.

## KRØV TIL TILBOÐSGEVARA

Greið lýsing av hugskotinum og dokumentarsendingini. Tú skalt hava vitan um tað at framleiða sjónvarpsdokumentar, hava greiða fatan av dokumentarsjangruni og duga gott føroyskt mál.

## KRØV TIL TILBOÐIÐ

Eina lýsing av dokumentarsendingini. Hvat hon snýr seg um, og hvussu tú kundi hugsað tær at lagt sendingina til rættis.

## KRINGVARP FØROYA KANN VEITA

- Myndafólk
- Atgongd til savn
- Útgerð
- Klipping
- Myndaviðgerð
- Ljóðeftirviðgerð
- Redaktør

## FÍGGING

Løn/samsýning sambært avtalu

KVF tilskilar sær rættin til at leggja dent á yrkisføri og veitingartrygd.

KVF tilskilar sær somuleiðis rættin at vraka øll innkomin tilboð.

Freistin at bjóða seg fram at gera dokumentar er 1. sept 2019.

Umsókn skal sendast til utbod@kvf.fo.
Hevur tú spurningar, kanst tú venda tær til Kára Sólstein, leiðara á Mentan, tlf. 296634, karisol@kvf.fo

KVF hevur eitt skipað samstarv við framleiðslueindir uttan fyri stovnin, bæði feløg og einstaklingar. KVF bjóðar tí út sendingar sambært viðtøkum í public service sáttmálanum.

KRINGVARP FØROYA

Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Eitt stýri við sjey limum stjórnar stovninum.
Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá kunngerðum, ískoytisveitingum og eydnuspølum.
Kringvarp Føroya hevur fýra deildir: Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting.